# Til læraran

Undirvísingargongdin til bókina *Sólgrátur* er ætlað sum íblástur til lærarar og næmingar.




**Sólgrátur**

**Ingun Christensen**

Bókadeild Føroya Lærarafelags, 2021

Asta Wolles, Eilen Anthoniussen, Emmy Joensen og Gunvá Magnussen

Nám 2022

## Endamál

Endamálið er at lesa skaldsøgur, har næmingarnir fáa eina góða lesiuppliving, bæði við at lesa sjálv, lesa upp, lesa saman við øðrum og hoyra upplestur. Endamálið er eisini at menna førleikan at grunda um innihaldið og viðgera skaldsøgur sum tekstslag og seta í frásjón.

## Næmingafortreytir

Væntað verður, at næmingarnir duga at lesa, lurta og skilja innihaldið í tekstinum.

Væntað verður, at næmingarnir duga at arbeiða sjálvstøðugt og í bólki og duga at leggja fram á ymiskan hátt.

## Um bókina

Skaldsøgan *Sólgrátur* kom út í 2021 og er um 15-16 ára gomlu ættleiddu gentuna Aud. Hon heldur, at lívið er strævið, í skúlanum eru tey ikki so fitt við hana og hon kennir seg at vera uttanfyri. Heima hevur hon tað heldur ikki so lætt. Sambandið við foreldrini er ikki so opið, sum Aud kundi hugsað sær, hóast hon veit, at foreldrini eru góð við seg.

©Nám

Aud hugsar nógv um tað at vera ættleidd og sín uppruna. Eisini ger hon sær tankar um Kolumbia, haðani hon er ættleidd. Í fleiri førum hugsar Aud um, at henni manglar rótfesti, tí at hon ikki veit hvør hennara biologiski uppruni er.

Happing fyllir nógv, serliga tá ið Aud byrjar at fáa niðrandi boð inn á telefonina.

Vinalagið við vinkonuna Vígdis fyllir nógv, og gerst tað uppaftur truplari í skúlanum, tá ið Vígdis flytur.

## Arbeiðshættir

Næmingarnir fara at arbeiða sjálvstøðugt, í bólki og í flokshøpi, bæði munnliga og skrivliga. Allir næmingar skulu lesa skaldsøguna, men tað kann gerast á ymiskan hátt. Skiftast kann ímillum sjálvstøðuga lesing í skúlanum og heima, parlesing, bólkalesing og upplestur frá lærara ella næmingum.

Uppgávurnar eru skipaðar eftir leistinum *áðrenn tit lesa*, *meðan tit lesa* og *tá ið tit hava lisið*. Uppgávurnar eru skipaðar sum floksprát, einstaklingauppgávur, makkarauppgávur og bólkauppgávur. Uppgávurnar til *Sólgrátur* eru ætlaðar 7.–9. flokki.

Tíð: Vit meta, at arbeiðið við bókini *Sólgrátur* og uppgávunum tekur uml. 15 undirvísingartímar umframt heimaarbeiði.

Vit mæla til, at lærarin lesur tríggjar fyrstu partarnar "Forleikur", "Sólsmúkkan" og "Skúlakjallarin" fyri næmingunum. Hetta er fyri at geva øllum næmingum somu inngongd til søguna, tí tað kann kennast summum tungt at byrja eina bók.

Tosa við næmingarnar um byrjanina og tað, tey fáa at vita í fyrstu pørtunum.

Niðanfyri verða nøkur faklig førleikamál lýst, sum arbeiðið við bókini Sólgrátur kunnu fata um. Lærarin avger altíð, hvørji faklig førleikamál dentur verður lagdur á.

©Nám

## Førleikamál

Undirvísingargongdin til *Sólgrátur* leggur upp til, at næmingarnir fáa høvi at stimbra og menna hesar fakligu førleikar:

- *at lesa raðið og skilur tað, sum lisið verður, og dugir at grunda um innihaldið*
- *at gera metingar og niðurstøður um ymiskt, sum næmingurin hevur sæð, hoyrt og lisið og grundgeva fyri egnum sjónarmiðum*
- *at orða seg rætt og greitt og nýta málið sum amboð í samrøðu, samstarvi og framløgu*
- *at nýta viðkomandi samskiftishættir og grundgevingarhættir eftir endamáli og samskiftisstøðu*
- *at nýta hóskandi lesisnildir grundandi, her ímillum at snarlesa, nærlesa og punktlesa*
- *at greina, tulka og seta í frásjón ymisk fagurbókmentalig tekstsløg*

(úr námsætlanini fyri føroyskt).

## Um rithøvundin

Ingun Christensen hevur skrivað bókina *Sólgrátur*. Hon er útbúgvin korrespondentur í enskum og týskum, seinastu árini hevur hon verið í parttíðarstarvi í Meginfelag áhugaleikara Føroya og lutvíst skrivað bøkur. *Sólgrátur* er hennara 12. bókaútgáva, m.a. hevur hon skrivað bøkurnar um Rana og faktakrabbarnar *Annika í Dímun*, *Katrin í Toftum*, *Húsfrúgvin í Húsavík* og *Løgmansdóttirin á Steig*.

## Ummæli

Bókasavnið við Løkin: Á facebook vanganum hjá Bókasavninum við Løkin ber til at lesa eitt ummæli av *Sólgrátur*.

Sosialurin 1/5-22: Ummælið eftir Arnbjørn Ó. Dalsgarð liggur aftast í lærarapartinum. Kanska eru onkur góð hugskot at finna í ummælinum.

Nón 3/5-22: Samrøða við Ingun Christensen um *Sólgrátur*. Møguleiki er at lurta eftir samrøðuni á heimasíðuni hjá Kringvarpinum.

©Nám

## Áðrenn tit lesa

- Hyggið at permumyndini og lesið baksíðutekstin og tekstin í klaffunum.
- Tosið saman um, hvat bókin man fara at snúgva seg um.
- Hvat vita tit um rithøvundin?

Hyggið fyrst at permumyndini og bið síðan næmingarnar gera sær tankar um, hvat bókin man vera um. Tit kunnu tosa um sjálva tekningina, um litirnar, persónin á tekningini, skrift, hví heitið á bókini stendur upp og niður o.a.

Lesið síðan baksíðutekstin og tosið um, um tit á permumyndini sóu tað, sum bókin er um.
Í klaffunum inni í bókini fáa tit meira kunning, og tað er gott at fáa við, áðrenn tit lesa bókina.

## Meðan tit lesa

- Hav ein blýant og pappír við hondina og skriva niður tað, sum tú metir vera áhugavert at tosa við hini í flokkinum um.

Endamálið við hesum er:

  - at næmingarnir venja at støðga á við ókend orð, men ikki støðga upp
  - at næmingarnir velja einstøk orð, sum tey skriva niður, við tí fyri eyga at kanna orðini nærri og soleiðis skilja týdningin
  - at næmingarnir kunnu sita saman við einum makkara og umrøða orðini. Ofta er gott at hava floksprát um trupul orð, sum næmingarnir vísa á
  - á sama hátt kunnu tey skriva niður eitthvørt, sum tey undrast á ella halda vera áhugavert.

- Emojiuppgáva: Nýt emojis á telefonini at lýsa hvønn kapittul. (Nýt appina til notur á telefonini ella teldlinum).
- Halt eyga við yvirskriftunum til hvønn kapittul. Hvat siga tær um innihaldið?
- Hugsa serliga um sambandið millum Aud og hinar persónarnar.

Tá ið tey eru liðug at lesa, skulu næmingarnir arbeiða við sambandinum millum Aud og hinar persónarnar í bókini, tí er gott, um tey eru varug við, nær tey møta hesum og skriva tað niður, so hvørt sum tey lesa.

## Tá ið tit hava lisið

- Tosið um sólsmúkkuna. Hví hevur hon serligt virði fyri Aud?
- Nakrar ábendingar eru í bókini um, hví smúkkan hevur so stórt virði fyri Aud, men kanska er okkurt, sum vit ikki fáa at vita, og næmingarnir gera sær tankar um.
- Lesið brotið um ættartræið á s. 10 og um eikitræið á s. 11. Hon sær seg sum eitt blómutyssi í einum vasa. Hvat merkir hetta?
- Her kunnu vera nógv svar. Tað hevur týdning, at næmingarnir sleppa at hugleiða um hetta brotið og síni svar.
- Nevnið nøkur evni ella viðurskifti, sum tit halda vera áhugaverd.

©Nám

# Evni at arbeiða við

Persónar og leiklutir. Setið orð á hesar persónar og teirra umhvørvi:

- Aud
- Vígdis
- Markus
- Mariann

- Vel ein persón úr bókini, tú kundi hugsað tær at arbeitt við. Tosið um trivnað og vinalag í flokkinum.
- Høvuðspersónurin verður happað. Hvat vita tit um talgilda happing? Er talgild happing øðrvísi enn beinleiðis happing?
- Nær og hvar sigur ein frá? Hvussu kunnu tey vaksnu hjálpa, tá tey ikki vita, hvat gongur fyri seg?
- Kundi søgan um Aud farið fram á einum føroyskum skúla?
- Hevði søgan verið øðrvísi, um høvuðspersónurin var ein drongur?

Upplagt er at tosa við næmingarnar um tað at siga frá. At inndraga tey vaksnu í sambandi við happing, er ikki at slatra, men at handla skilagott. Tað ber til at fara til flokslæraran ella ein annan lærara ella heilsufrøðingin á skúlanum. Eisini ber til at tosa við Tú og eg ráðgevingina hjá Barnabata.

©Nám

## Aðrar uppgávur

Ger eina kreativa uppgávu um lýsingina av eikitrænum og blómutyssinum í vasanum (Tekstbrot á síðu 11).
Skriva eina hugleiðing um, hvussu Aud fær sólsmúkkuna.
Skriva ein nýggjan enda, har høvuðspersónurin fer til Bogota at leita eftir familjuni.

**Spegl/vindeyga**

Tankin við hugtakinum *spegl* er at hjálpa næminginum við at finna brot, sum hann kann spegla sær í.

Tankin við hugtakinum *vindeyga* er eitt slag av frásjónargerð. Her verða tekstbrot viðgjørd, sum víðka sjónarringin hjá næminginum. Sí tvey dømi um spegl og vindeyga niðanfyri:

- Vel eitt brot úr bókini, sum tú kennir teg aftur í.

Endamálið er at fáa næmingarnar at greiða frá, hví og hvussu teir kenna seg aftur í valda brotinum.

- Hvat sigur bókin um, hvussu tað er at vera ung/ur í eini familju, har tey vaksnu stríðast við eitt nú sálarsjúku, rúsdrekkamisnýtslu, sjúku o.s.fr?

Hvussu nógv smileys gevur tú Sólgráti? (Frá 1-6).

## Frásjónargerð

- Set *Sólgrátur* í frásjón til aðra bók, sjónvarpsrøð ella film, sum tú hevur lisið ella sæð. Evnini eru nógv í bókini, so helst hava allir næmingar lisið ella sæð okkurt, sum tey kunnu seta í frásjón til bókina.

Nøkur av evnunum, sum tey møta í bókini eru hesi:

- Einsemi
- Happing og talgild happing
- Kropsfatan
- Ættleiðing
- Sálarsjúka
- Sjúka í familjuni
- Kærleiki (mamman, pápin, fastirin) vaksnar relatiónir.
- At kenna seg fremmandan
- Vinalag (hvat skuldi Markus gjørt?)

©Nám

UMMÆLI

# LÍVIÐ ER STRÆVIÐ

**Í nýggjari ungdómsskaldsøgu fylgja við ættleiddu gentuni Aud, sum upplivir happing og sjúku í familjuni. Bókin viðger nógv evni, sum eru viðkomandi fyri ungfólk, og hon er eisini góð hjá foreldrum at lesa**

*Arnbjørn Ó. Dalsgarð*

★★★★☆☆

| |
|---|
| **Ingun Christensen** |
| *Sólgrátur* |
| 165 síður |
| Bókadeild Føroya Lærarafelags, 2022 |




**Nýggj føroysk ungdómsskaldsøga** er komin út. Bókin eitur *Sólgrátur*, og tað er Ingun Christensen, sum hevur skrivað. Bókadeild Føroya Lærarafelags gav út.

Skaldsøgan snýr seg um gentuna Aud, sum er ættleidd úr Bogotá, og sum veksur upp í einari føroyskari bygd, umleið ein hálvan tíma frá Havnini.

Í skúlanum verður Aud happað, tí hon hevur myrkan húðarlit, og hon fær eisini ljót boð sendandi frá einum ókendum nummari. So flytur besta vinkonan, Vígdis, til Havnar, og ilt verri gerst støðan av, at mamman er tunglynt og liggur í songini, eftir at hava mist beiggjan, og at fastirin, sum Aud er ógvuliga góð við, gerst álvarsama sjúk.

Tá ið søgan byrjar, er Aud nýliga blivin tilvitað um sítt upphav, og tað fær hana til at kenna seg einsamalla. Hon droymir um at fara til Bogotá at leita eftir familju sínari, men hon veit, at tað er nærum ógjørligt, tí hon varð funnin á gøtuni, so ongin veit, hvørji biologisku foreldur hennara eru.

Støðan batnar, tá ið ein nýggjur drongur kemur í flokkin. Markus er heldur ikki heilt sum hini, og tey bæði, Aud og hann gerast góðir vinir. Markus hevur tailendska mammu og føroyskan pápa, og so hevur hann ein vinmann, sum situr í koyristóli.

Men best sum alt tykist ganga rættan veg aftur hjá Aud, hendir nakað, sum broytir alt. Hvat tað er, skal lesarin sleppa at finna út av sjálvur.

Hetta er í stuttum tilfarið, sum skaldsøgan *Sólgrátur* er bygd úr.

**Í fyrstu atløgu** tykist skaldsøgan at vera eitt sindur tilgjørd. Tú fært sum vaksin lesari eina kenslu av, at skaldsøgan tilvitað er bygd eftir einum leisti, har miðað hevur verið eftir, at hon skal innihalda so nógv sum til ber av evnum og tvístøðum, sum rigga væl at viðgera í 7.–10. flokki í fólkaskúlanum.

Umframt spurningin um ættleiðing, familju og uppruna, hava vit evni sum happing, nethapping, forelskilsi, samkynd, rúsdrekka, sjúku, sjálvmorð, sálarkvøl, strongd – fyri at nevna nøkur.

Tað kann væl vera, at so er, men tað hevur í hvussu er eydnast rithøvundinum, saman við ritstjórunum á Bókadeild Føroya Lærarafelags, at skapa eina góða og áhugaverda ungdómsskaldsøgu burtur úr øllum hesum, sum bæði er væl skrivað, og hongur væl saman. Onkrar smávillur eru, men tær eru fáar og hava mest sum ongan týdning fyri innihaldið.

**Sum foreldur er** tað serliga áhugavert at lesa um, hvussu ung í aldrinum 14-16 ár, tá ið so nógv leikar á av øllum møguligum í teirra egna lívi, og tey skulu finna út av, hvørji tey eru ella vilja vera, samstundis hugsa um trupulleikarnar hjá foreldrunum og øðrum vaksnum, men vilja ikki liggja teimum til byrðu. Hetta er eitt gjøgnumgangandi tema, sum kemur fyri fleiri ferðir, tá ið Aud ikki vil fara til pápan við sínum trupulleikum, tí hon heldur, at pápin hevur ovmikið at bera longu sum er.

Tað er ein stór ábyrgd, vit vaksnu leggja á tey ungu. Sæð í hesum ljósi, er hendan skaldsøgan eisini góð fyri foreldur at lesa, og hon skrivar seg beinleiðis inn í aktuella kjakið um sálarstøðuna hjá teimum ungu í dag, og tað er gott. Tað er ikki altíð, at vit fáa gjørt so nógv við støðuna, men tað er gott, at onkur ger vart við tað, so at vit vaksnu verða meira tilvitað um, hvussu nógv tað hevur at týða fyri tey ungu, at foreldrini og ommur og abbar hava tað gott, og at hendan umsorgan kann gera, at tey ungu seta seg sjálvi til viks, júst tá tey sjálvi hava mest brúk fyri stuðli og umsorgan.

**Ég havi í** øðrum ummæli her í blaðnum verið inni á spurninginum um, hvat ein rithøvundur kann loyva sær at skriva um. Kann ein hvítur føroyskur rithøvundur

> “Umframt spurningin um ættleiðing, familju og uppruna, hava vit evni sum happing, nethapping, forelskilsi, rúsdrekka, sjúku, sjálv-morð, sálarkvøl, strongd – fyri at nevna nøkur”

skriva út frá sjónarhorninum hjá einum persóni við døkkari húð, sum hevur sítt upphav í einari heilt aðrari mentan, soleiðis sum Ingun Christensen her ger? Kunnu rithøvundar yvirhøvur loyva sær at skriva út frá øðrum sjónarhornum enn sínum egna, tað vil siga sínum egna kyni, sínum egna húðarliti, sínum egna mentanarliga uppruna og so framvegis?

Sjálvur haldi eg ikki, at nakað mark eigur at vera, men úti í heimi eru ymsar meiningar um tað. Eg hevði neyvan sæð meg føran fyri at skriva eina søgu í sjónarhorninum hjá einum drongi, sum var ættleiddur út Bogotá, men soleiðis eru vit so ymisk, og tað er gott. Spurningurin er, um teir lesarar, sum sjálvir eru ættleiddir, kenna seg aftur í søguni, tá ið tey lesa *Sólgrátur*. Hesir spurningar eru áhugaverdir spurningar, sum eisini kunnu takast upp, tá ið bókin verður lisin og viðgjørd í skúlanum.

*Sólgrátur* er tólvta bókin hjá Ingun Christensen í tólv ár, og mær vitandi er talan um fyrstu ungdómsskaldsøga hennara. Hon gav í 2014 út *Skuggamyndir*, sum er stuttsøgusavn til ung, og annars hevur hon givið út endursagdar sagnir og bøkur til smærri børn.